

## ÁBØTUR

*Í longri tíð hava menn arbeitt við at gera ábøtur og umvælingar á brúnna um Streymin. Teir hava m.a. gjørt ábøtur á brúgvarplátuna, við at isolera ímóti vætu, eins og teir hava breiðkað koyribreytina. Sum skilst verður farið undir at asfaltera norðaru helvtina seinni í mánaðinum*



## BÁTALÍV

*Nógvum hvalvíkingum dáma væl at brúka frítíð sína í stuttleikabátum sínum. Her hyggja tveir mans eftir tí triðja, sum er í ferð við at flota snøgga stuttleikabát sín*



## VATNIÐ

*Eitt av arbeiðunum hjá monnunum hjá Sunda kommunu er at tryggja øllum íbúgvunum reint drekkivatn. Teir vóru í farnu viku í ferð við at skifta út høvuðsvatnveitingina í Hvalvík. Rørini skulu setast saman frammanundan, og tað eru teir báðir - Dávur Emil Hansen og Andras Nybo her í ferð við*